# H71

faldari 9

## FTZ KAPPINGIN

# H71 - KÍF

Leygardagin 16. apríl kl. 16.00

Hoyvíkshøllin




SUÐUROYAR SPARIKASSI
J&K
BONUS -er biligari!
P/F THOMAS DAM ÍTRÓTTARDEILDIN · N. Finsensgøta 5 · Tel. 31 14 03
polytan
Advokatfelagið Yviri við Strond 4
Auto Service
INNI

AnniJanni

# FOKUS 18:29




## Ger tínar dreymar til veruleika

- sama um tú vilt fara undir útbúgving, ert sjómaður ella vilt spara saman til eini hús.

Fokus pakkin hevur alt tað tú hevur tørv á - NemKontu, FokusLán, FokusKreditt, Gjaldskort, Netbanka og FramtíðarKontu. Sum Fokus kundi fært tú ókeypis tænastur, lagaliga fígging og góða rentu.

**Gjaldskort** **Netbanka** **Fígging** **FramtíðarKonta**

Vitja deildina í Vági og Havn.

**ss.fo**

SUÐUROYAR
SPARIKASSI


SMYRIL LINE
EXPLORERS OF THE NORTH ATLANTIC
Frítíðin byrjar umborð
WWW.SMYRIL-LINE.COM
Lætt og ómakaleyst ber til at koyra bæði Danmark, Ísland og alt Evropa upp og niður, júst tá passar tær. Við egnum bili er alt nógv lættari. Pakka viðførið í bilin, koyr umborð og njót ferðina.
Tá tú ferðast við Norrönu, kanst tú byrja at halda frí, leingi áðrenn tú kemur fram til títt frítíðarstað ella summarhús. Umborð á Norrönu kanst tú halda frí, so tað stendur eftirí.
Les meira á www.smyrilline.fo, skriva til booking@smyrilline.fo ella ring 345900

# KONFIRMATIÓNIN



Páskirnar eru farnar afturum bak, páskareggini rullaði og etin, og gerandisdagur er aftur. Helst er friður um at falla yvir tey mongu heim í Hoyvík, ið hava haft konfirmatión um páskirnar – ein lætti, at tað er væl yvirstaðið. Minnist sjálvur við sorgblíðni aftur á tær konfirmatiónir, ein sjálvur hevur haft. Uttan annars at úttala meg um konfirmatiónina, so kemst tó ikki uttanum, at tað eisini er ein góður varði fyri útinnan av mongum arbeiði við hús, at skula hava konfirmatión. Minnist at eg hevði umleið 100 leygardagar, har eg kundi fyriskipa stoyping av kjallaratrappu uttanduraða, men varð hetta ikki gjørt fyrr enn leygardagin fyri konfirmatiónina hjá einum av synunum. Lukkutíð høvdu vit konfirmant, annars hevði trappan neyvan verið stoypt enn.

Annars var tað hugnaligt at uppliva konfirmatiónirnar í Hoyvíkar kirkju bæði Pálmasunnudag og sunnudagin frammanundan. Heilir 35 konfirmantar íalt. Væl liggur fyri hjá Theodor presti at fara um teir ungu konfirmantarnar, og tyktust hesir eisini at trívast væl saman við presti. Ikki tykkum at siga, vóru stórur partur av konfirmantunum íðkandi leikarar hjá H71 – annað vildi verið løgið, nú vit umrøða konfirmatiónir í Hoyvíkar kirkju – og kláraðu teir seg eisini væl í hesi støðu. Vanliga eru hesir at síggja í venjingarbúnum við

*Framhald á síðu 13*

2X3
TIMBUR HT TILFAR HANDILIN



# Avatara

## Ein heilt nýggj og serstak verð innan gólv

**AVATARA**

Avatara er eitt gólv við fyrimunum frá bæði tí slitsterka laminatgólvinum og tí ektaða parkettgólvinum. Nýggja avataragólvið líkist fullkomiliga einum trægólvi, hevur træstruktur og er mjúkt og heitt, júst sum træ. Samstundis er avataragólvið líka slitsterkt sum eitt laminatgólv og krevur einki viðlíkahald. Prísurin er heldur ikki at fara skeivur av: Avataragólvið er munandi bíligari enn eitt parkettgólv.



Prísir úr
158,-
fyri m²

30 ára
garanti

NÓGV YMISK
& SERA VØKUR
MYNSTUR

- Júst sum træ at síggja til
- Strukturin kennist sum træ
- Heitt og mjúkt at ganga á
- Luktfrítt og heilsugóðkent
- Slitsterkt sum laminatgólv

TIMBUR HT TILFAR HANDILIN


Lundin Financials
Lundin Løn
Trygg
fíggjarstýring
SENDISTOVAN


VANILJU
KREM
Tað besta omaná
Forkela familjuna. Royn okkara
leskiliga vaniljukrem.
Nýggj vøra!
SENDISTOVAN

SENDISTOVAN

NordikSOLO 18+

# Kom best frá byrjan við NordikSolo



Ert tú millum 18 og 28 ár, kanst tú gerast NordikSolo kundi og fáa eina rúgvu av ókeypis tænastum og serliga góðum rentum.

Vitja www.banknordik.fo/solo og gerst NordikSolo kundi.

BANKNORDIK

Pf. Jógvan Weihe

P/F Jógvan Weihe | Tel: 35 38 97 | Fax: 35 38 98

www.weihe.fo | weihe@weihe.fo

P/F Hjá Fróða

Jónas Broncksgøta 25
Tel 35 09 00
Fax 35 09 01
frodi@hjafroda.fo

Flügger




LM ELECTRIC - 100 TÓRSHAVN - HOYVÍKSVEGUR 53
TEL 35 12 20 - WWW.LM.FO - LM@LM.FO

fk

Keyp ein Toyota - og fá ein 3 ára servicepakka

Ongar útreiðslur til viðlíkahald í 3 ár



REYNI SERVICE
tel. 35 30 40 - www.reyniservice.fo



Dekk
- Vit selja øll sløg og allar støddir
- Vetrardekk á sportsfelgum
- Vit hava helst besta prísin
- Góð tænasta og góðir prísir
- Bil or not to bil
- sjálvandi frá Bilrøkt!
bilrokt.fo
Ring 35 88 88 og bílegg tíð
Opið gerandisdagar frá 08.00 - 17.00
og leygardagar frá 10.00 - 13.00
Stiðjagøta 3 · FO-100 Tórshavn · Tel: 358880 · Mobil: 235880 · bilrokt@bilrokt.fo · www.bilrokt.fo




WAAG
& COMPANY
WAAG & Co. P/f
Hoyvíksvegur 63
110 Tórshavn
Tel: 31 36 66
waag@waagbilar.fo
www.waagbilar.fo
OPIÐ ER: MÁNADAG - FRÍGGJADAG: 8.00 - 17.00
WAAG
& COMPANY

vistir.fo
haraldsen






## AVSLÁTTARSKIPAN

### BETRI TÚ ERT TRYGGJAÐUR -
# STØRRI AVSLÁTTUR

| | |
|---|---|
| 2 tryggingar | -3% |
| 3 tryggingar | -8% |
| 4 tryggingar | -12% |
| 5 ella fleiri | -15% |
| 5 ella fleiri + Betri pensjón | -32% |

Tú fært avsláttur av inngjaldinum til tínar privatu tryggingar hjá Tryggingarfelagnum Føroyum, um tú hevur tvær ella fleiri privatar trygg-ingar hjá okkum. Fleiri tryggingar tú hevur, størri avsláttur fært tú.

Hevur tú inngjald til Betri pensjón á minst 10.800 krónur árliga, fært tú 20% í avslátti av tínum privatu tryggingum hjá Tryggingarfelagnum Føroyum, líkamikið um tú hevur 1, 2, 3, 4 ella fleiri privatar tryggingar.

**Tilsamans kanst tú fáa heilt upp til 32% í avslátti**

*Set teg í samband við okkum á telefon 345600 ella tf@trygging.fo og fá eitt tilboð uppá tryggingar og pensjón.*

Betri pensjón

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

ÁTAKSTILBOÐ:
**LUKSUS FAMILJUBILUR ÚR 390.000 KR**



**NÝGGJUR VOLVO V70 TRIBUTE**
**EITT SINDUR MEIRI AV TÍ GÓÐA TIL TÍN**

VOLVO

Volvo V70 er ein sannur svenskur stationbilur. Stórur, høgligur, tryggur og sannførandi gjøgnumførdur úr enda í annan. Tann nýggi Tribute frá 2016 er veruligt skandinaviskt marglæti í teirru góðu og kendu Volvogóðskuni og við einum longum lista av útgerð. Fíggjarliga kanst tú gera kubbið júst nú bæði í mun til sjálvan bilin og í mun til útgerðspakkan. Bóka ein royndartúr hjá Wenzel

**ÚR 390.000 KR**

P/F Wenzel I Akranesgøta 5 I FO-100 Tórshavn I tel 35 45 00 I fordpost@wenzel.fo I www.wenzel.fo

WENZEL

NORÐOYA SPARIKASSI

# Orkulán 2,5%

*- Bústaðarlán við lágari rentu*

***Bílegg eitt kundaprát***
*og fá meira at vita um fyrimunirnar við orkuláninum*



*Norðoya Sparikassi - Hoyvíksvegur 67 - FO-100 Tórshavn Tel. 47 5000 - ns@ns.fo - www.ns.fo*

*Framhald av síðu 4*

hondbólti í hond og var stuttligt at uppliva teir frammanfyri altarinum stásklæddar. Nakað kroystir kanska, men ikki so tað bilaði.

Ein kann so spyrja, hvat konfirmatión hevur við hondbólt og faldaran hjá H71 at gera. Sjálvsagt er hondbóltur ikki ein religión *(sjálvt um ein til tíðir kanska ivast í, um ikki hondbóltur fyri summi júst er religión, so høgt verður gingið uppí hetta spæl)*. Men hóast hondbóltur ikki er ein religión, so kann ein kanska loyva sær at gera ein samanburð millum gongdina í at verða konfirmeraður og so gongdina í eini landskapping í hondbólti.

Sum kunnugt skulu konfirmantarnir ganga til undirvísing og endar hetta alt við eini konfirmatión í kirkjuni – finalan innan fermingina. Taka vit so hondbóltin, so skulu tey íðkandi luttaka í venjing og landskapping innan hondbóltin og endar hetta alt við finalum – konfirmatiónin innan hondbólt.

Sjálvsagt kann ávísur samanburður gerast millum bygnaðin í skipanunum innan konfirmatión og hondbóltskapping. Men óansæð samanburð, so vil í øllum førum altíð vera ein altavgerandi munur millum bygnaðin í hesum báðum skipanum – við konfirmatiónina í kirkjuni, verða allir luttakararnir vinnarar og

"Við konfirmatiónina í kirkjuni, verða allir luttakararnir vinnarar og sigursharrar – innan kappingarítróttina er bert ein sigursharri, nevniliga hann, ið vinnur finalurnar

sigursharrar – innan kappingarítróttina er bert ein sigursharri, nevniliga hann, ið vinnur finalurnar.

Konfirmatiónirnar nú til várs eru sum sagt liðnar, og allir konfirmantarnir vórðu sigursharrar. Nú liggja endaligu finalurnar innan hondbóltskappingina 2015/16 fyri framman, og í teimum verða ikki øll sigursharrar. H71 liggur í broddi fylkjurnar í nærum øllum deildum í hondbóltskappingunum í ár, og verður spennandi at síggja, um vit fáa sigursharrar í nøkrum teirra, tá landskappingin um ein góðan mánaða er lokin, og krútroykurin hevur lagt seg.

*Livst so spyrst.*

**Ítróttarfelagið Hoyvík H71**
Hoyvíkshøllin, Postsmoga 1067
188 Hoyvík · www.h71.fo

**NEVND**
Sunneva Jakobsen, forkvinna
231115, sunneva@liv.fo

Gunn Ellefsen, næstforkvinna
593040, ge@lawfirm.fo

Agga Niclasen, 508689
h71faldarin@gmail.com

Anna Dam, 519082
ad@lawfirm.fo

Rene Dahl Olesen, 235930
renedahlolesen@gmail.com

Emy Sólvitsdóttir, 513769
emys@olivant.fo

Bergtóra Høgnadóttir, 286011
bergtorajoensen@gmail.com

Janet Fríða Johannesen, 212211
jjoh@olivant.fo

Randi Frederiksberg, 212000,
randi.frederiksberg@gmail.com

**ÁBYRGD AV FALDARA**
Sunneva Jakobsen,
231115, sunneva@liv.fo

**ÁBYRGD AV HEIMASÍÐU**
Agga Niclasen, 508689
h71faldarin@gmail.com

**SNIÐ, UMBRÓTING,
PRENT OG LIÐUGTGERÐ**
Pf. Føroyaprent, www.foroyaprent.fo
– svanamerktur prentlutur 541 705
*Forsíðumynd: Jan Sørensen*

**ÚTGEVARI**
H71

# STØÐIÐ ER BÆÐI HØGT OG LÁGT

**NAKRIR SPÆLARAR ERU SERA VÆL FYRI, OG TEIR VERÐA SPENNANDI AT FYLGJA, MEN NÓGVIR UNGDÓMAR ERU OV ILLA SKÚLAÐIR. SKAL HONDBÓLTURIN STANDA SEG STERKARI Á ALTJÓÐA PALLINUM, MUGU VIT BREIÐKA GRUNDARLAGIÐ, OG FELØGINI MUGU TAKA BARNA- OG UNGDÓMSVENJINGINA Í STØRRI ÁLVARA.**

*Eftir: Dia Midjord*

Yvirskriftin er mítt frægasta svar, skal eg meta um støðið í føroyskum barna- og ungdómshondbólti. Mín meting byggir á tað, sum eg havi sæð í barna- og ungdómsdystum, tí eg veit ikki, hvussu ungdómsarbeiðið er skipað í feløgunum, hvønn leist arbeitt verður eftir o.s.fr.

Eg havi tó varhugan av, at føroyskir barna- og ungdómsvenjarar stundum máta framgongdina í mun til úrslitið á máltalvuni og minni í mun til menningina hjá tí einstaka spælaranum. Mín fatan er eisini, at ov fá feløg taka uppgávuna at venja børnini í nóg stórum álvara, tí tað er ein sera krevjandi uppgáva, sum nógv feløg undirmeta.

Avbjóðingin er, at hondbóltur fyri børn er nógv øðrvísi enn hondbóltur fyri ung og vaksin. Grundlutirnir í spælinum eru teir somu óansæð aldur, men munurin er ovurstórur, hvussu níggju ára gamla gentan og 28 ára gamla kvinnan skilja og íðka spælið.

Barnavenjarin skal tískil hava vitan um børn, eitt nú hvussu tey rørsluliga og kropsliga búnast. Barnavenjarin skal eisini hava vitan um venjingar, hvussu børnini læra o.s.fr.

Harafturat er tað uppgávan hjá barnavenjaranum at fáa foreldrini sum viðspælarar, ið kenna sín leiklut. Áskoðanin hjá foreldrunum hevur stóran týdning fyri børnini, venjaran og ikki minst fyri felagið. Barnavenjarin skal tí práta við foreldrini og fáa tey at skilja leiklutin, at tey skulu stuðla barninum í tilgongdini at búnast.

At menna unga spælaran er sum sagt fremsta uppgávan hjá einum barna- og ungdómsvenjara. Harvið er ikki sagt, at úrslitið einki hevur at týða, tí uttan kapping og úrslit, hvørvur hugurin hjá børnunum fyri stuttliga spælinum. Men børnini skulu venja og spæla fyri at menn-



ast, og tí má úrslitið á máltalvuni ikki vera avgerandi fyri, um venjingin ella dysturin eydnaðist væl. Tú kanst siga tað soleiðis, at góðir barna- og ungdómsvenjarar, fáa ikki viðurkenning sína, fyrr enn nógv ár seinni, tá spælarin sum vaksin fær gjøgnumbrot og ger um seg ímillum tey bestu.

Tað er ómøguligt at meta um, hvussu vaksna útgávan av einum hondbóltsspíra tekur seg út. Tá barna- og ungdómsvenjarin ikki kann vita, hvør spælari megnar at røkka toppin, er tað sera umráðandi at venja øll børnini. Verður hjúklað um øll, varðveita børnini hugin at venja og spæla hondbólt – og hondbóltsfamiljan fjølgast.

Tað er eingin loyna, at barna- og ungdómshondbólturin hevur ment seg seinnu árini, og vit eiga nakrar evnaríkar ungar spælarar. Tó er tað eitt sindur ørkymlandi, at árgangir eru so ójavnir, og at spennið ímillum spælarar á sama liðið er í meira lagi.

Ein felagsleistur, har frálæran í aldursbólkunum verður skipað, kemur helst at gagna breiddini í føroyskum hondbólti – og tað er harðliga brúk fyri, um støðið skal hækka.

# HIN ELEKTRISKI STÓLURIN



## EINDRI TRÓNDARSON FRÝDAL

**Aldur**
21 ár.

**Pláss á vøllinum?**
Høgri bakkur og vongur.

**Hvør á liðnum er stórsta drama-queenin?**
Djóni Vest Højgaard.

**Hevur vánaligasta tónleikasmag?**
Andor Sivertsen.

**Hevur flottastu reyv?**
Tóraldur Kollsker uttan iva.

**Er festligast at vera í brúsu saman við?**
Tað má verða Aleksandur, hann er ein kaliber fúlari enn hini.

**Hvørjum leikara hjá kvinnunum hevði tú viljað farið á date við?**
Fíu Hoydal, hon sær so helvitis gott út.

**Hevur tú nøkur ritualir áðrenn dyst?**
Veit ikki um eg havi nøkur ritualir sum so, men eg knýti lissurnar á skógnum upp til tríggjar ferðir áðrenn dyst – tær mugu verða spentar heilt rætt.

**Hvat er tín besta hondbóltsuppliving?**
At verða á hondbóltsháskúla í Ikast í Danmark í eitt hálvt ár.

**Hvør er besti leikari, ið tú hevur spælt ímóti?**
Ein sum eitur Oliver.

**Hvat skoritriks hevur riggað best hjá tær?**
At sorla til.

**Hevur tú nakra flovisliga hondbóltssøgu at fortelja?**
Tær eru nógvar. Eg byrjaði ikki at spæla hondbólt fyrr enn eg var 14 ár, so tá var tað øðiliga nógv sum mínir liðfelagir hildu var sjálvsagt, sum eg slett ikki visti, og tað er tað enn tann dag í dag, haldi eg.

**Hvat ger H71 til besta hondbóltsfelag í Føroyum?**
Tað er ringt at seta fingurin á nakað ávíst, men eg veit at vit eiga eina ómetaliga raska nevnd, ið arbeiðir hart fyri at fáa endarnar at røkka saman.

J & K

# ÆTLAR TÚ AT STOYPA?

Tosa fyrst við okkum.

Framkomna, teldustýrda betong-blandiskipanin syrgir fyri, at tú kanst vera heilt vísur í, at tú fært betong av allarbestu góðsku bæði til nýtslu á landi og undir vatni
Blandi- og pumpubilar okkara bera so í bandi, at útkoyring og fylling í formar v.m. ikki er nakar trupulleiki - heldur ikki um tvørligt er at sleppa framat.

Vit koyra um alt landið og eru kappingarførir í prísi!



J & K

## J & K Betong


á Hjalla | Postboks 3179 | FO-110 Tórshavn | tel 31 50 60 | fax 31 41 94 | e-mail: jkp@jkp.fo | www.jkp.fo
Blandimeistarin tel 58 50 25




Grannskoðan // Ráðgeving // Bókhald // Roknskapur

Skalt tú meta
um framtíðina
mást tú
kenna fortíðina

WWW.JANUAR.FO

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

SENDISTOVAN



# Takk fyri at tú stuðlar Javna

## Gerst limur í Javna

Far inn á okkara heimasíðu www.javni.fo, trýst á leinkjuna „Tekna teg sum lim“ og fylg vegleiðingini.

Hevur tú brúk fyri hjálp í sambandi við tilmeldingina, ring so til Javna á telefon 208090 ella 514827.

## Gerst stuðul hjá Javna

Ynskir tú at  stuðla okkum við einari fastari upphædd hvønn mánað, far inn á heimasíðuna www.javni.fo og trýst á leinkjuna „Stuðulsgjald“ og fylg vegleiðingini.

Hevur tú brúk fyri hjálp í sambandi við tilmeldingina, ring so til Javna á telefon 208090 ella 514827.

javni

Hoydalsvegur 40/Loftið
FO-100 Tórshavn
Tel +298 20 80 90
javni@javni.fo
www.javni.fo






polytan®

simonsen@polytan.dk
tlf: 0045 39405420
fax: 0045 26745420
polytan ligaturf 240/el-25
FIFA 2 stjørnu góðkent

# Er skeltingin í lagi?

Vilt tú síggja gott út, hava kundar í handilin ella bíleggingar til fyritøkuna, kann skeltingin gerast munurin millum at eydnast og ikki eydnast. Tað skal ikki altíð so nógv til, og tað nýtist ikki at kosta nógv.

**Hugsa stórt – hugsa Føroyaprent**



Á Føroyaprent hava vit eitt framkomið skeltiverkstað, har vit kunnu framleiða nærum alt, tú kanst hugsa tær.

- Lýsandi stavir á stórar bygningar
- Smá skelti sum t.d. navnaskelti til skrivstovuna
- Stórar plakatir og bannarar til tiltøkini í summar
- Foliuprent til veggir, vindeygu og bilin

Nethandil

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI 541 705

**Føroyaprent**
Tel. 31 45 55 www.foroyaprent.fo




# RÁKIÐ




www.torshavn.fo



Skapandi, mennandi, kveikjandi

TÓRSHAVNAR
KOMMUNA




Ung í Eik
www.eik.fo/ung
Tel. 348000
Eik

# Ársveitslan 2016

## Hoyvíkshøllin • 14. mai

**H71**

**45**

**ár**

Leygarkvøldið 14. mai verður ársveitslan hjá H71. Veitslan er fyri allar H71arar og viðhaldsfólk. Ársveitslan byrjar kl. 18.00, og tað er 18 ára aldursmark. Drykkjuvørur fáast til keyps.

## Kostnaður: 250 kr.

Atgongumerki kunnu keypast við at flyta pening á konto 9870 - 993.458.9 í Suðuroyar Sparikassa. Viðmerk navn og "veitsla". Tilmeldingarfreistin er 1. mai.

**H71**

Loysnir tel 214452

# *Hálvrundur*

# FØÐINGARDAGUR Í HOYVÍKSHØLL



*Eftir: Bergtóru Høgnadóttir*

Í vár verður H71 45 ár, og sjálvandi steðgaðu vit á eina løtu og dvøldu við hetta í felagnum. Í vikuni hava børn og unglingar spælt sínar seinastu dystir, so nú, áðrenn øll so smátt fóru hvør til sítt í eina tíð, vóru leikarar systkin og foreldur boðin til hallarbakaðar bollar og føroyskt kakao í stásiligu nýggju kantinu okkara. Eisini lat ein av stuðlum okkara – Bónus – okkum vælsmakkandi føroyskar ístertur frá Fóm.

Ein slíkan dag verður ein ikki sørt rørdur um hetta lítla felagið sum vegna eldsálir i Hoyvík sá dagsins ljós fyri 45 árum síðani. Mangt er hent síðani tá í søgu felagsins – og stuttligt og hugaligt var at fegnast um og fagna felagnum á 45 ára degnum. Eisini tóku vit eina felagsmynd uttanfyri høllina.

Forkvinna felagsins segði eisini nøkur vælvald orð við allar leikararnar og venjarar okkara. Rørandi at síggja øll hesi fittu snýðini á børnum og ungum hoyvíkingum, sum øll geva sítt íkast til felagið. Leikarar, venjarar, foreldur … vit eru mong sum taka lógvatak fyri felagið, so børn og ung í Hoyvík kunnu íðka. Og júst tí bar til at halda føðingardagin, við einari bjartari vón um at H71 nú, hóast 45 ár á baki, er komið fyri at vera. Felagið eldist við yndi og dugna.

Hetta var ein slíkur familjufagnaðar føðingardagur, men 14. mai, tá gleða vit okkum til at halda eina føðingardagsveitslu har 18 aldursmark verður. *Sí meiri á heimasíðu felagsins*. Øll sum eru 18 ár og eldri eru vælkomin at tekna seg til føðingardagsveitsluna, sum verður í stásiligu kantinu okkara í Hoyvíkshøll. Verið vælkomin, vit gleða okkum.





# HIN ELEKTRISKI STÓLURIN






**Aldur**
17 ár.

**Pláss á vøllinum?**
Havi nokk spælt á øllum plássum í ár, men spæli mest bakkur.

**Hvør er størsta drama-queenin á liðinum hjá tykkum?**
Hvat er ein drama-queen?

**Hevur vánaligasta tónleikasmag?**
Her vinnur Hørður í Geil við fleiri longdum.

**Hevur flottastu reyv?**
Hanus „The Machine“ Krett.

**Er festligast at vera í brúsu saman við?**
Steingrímur Hallson kemur ofta við nøkrum góðum gullkornum.

**Hvat er tað flottasta málið, ið tú hevur skorað í einum dysti?**
Skori bara flott mál. Men eg eri serliga stoltur av einum flúgvara, sum eg fekk sendandi úr okkara málið.

**Hvørjum leikara á kvinnusíðuni hevði tú helst viljað farið á date við?**
Her sigi eg bara einki.

**Hevur tú nøkur ritualir áðrenn dyst?**
Eg havi einki serligt, men eg lurti altíð eftir tónleiki, so tað kann kansa vera eitt.

**Hvat er tín besta hondbóltsuppliving?**
Tað var at vinna steypafinaluna í ár.

**Hvør er besti leikari, ið tú hevur spælt ímóti?**
Ein íslendari, sum spældi við U17 landsliðnum. Har var eingin vón.

**Hvat fyri skoritriks hevur riggað best hjá tær?**
At skora uttanfyri banan er ikki mín sterka síða.

**Hevur tú nakra flóvisliga hondbóltssøgu at fortelja?**
Tað var ein dystur í ár, har eg vann mær eitt straffi. Mark hevur aldrin lova mær at tikið straffi, tí eg dugi einki serligt at skjóta straffi, men hesuferð skuldi eg prógva fyri øllum at eg væl kundi. Eg stillaði meg kláran, dómarin floytaði, og bólturin fór so langt omanfyri málið. Eg rann aftur ímeðan fólk flentu og klappaðu eftir mær. Tað var einki stuttligt.

**Hvat ger H71 til besta hondbóltsfelag í Føroyum?**
Heilt sikkurt sterka samanhaldi og evnaríka og raska nevndin hjá okkum

# TÁ RÆTT SKAL VERA RÆTT

SENDISTOVAN



ADVOKATSKRIVSTOVAN

Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Eyðbjørn Larsen, adv.
Birita S. Samuelsen, adv.

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TELEFON: (298) 35 33 35 · TELEFAX: (298) 35 33 36 · WWW.JURA.FO


Bilasolan.fo
Nýggi Audi A3 Sportback
Langt á odda.
Audi
Vorsprung durch Technik
Bilasølan
Vegurin langi, 359700


Altíð okkurt
sunt og gott
www.fast.fo
fast:

# h71 klæðini 2015/16



h71 INTERSPORT
Thomas Dam Ítróttur
adidas


Vælkomin inn á
gólvið hjá okkum
... her finnur tú
altíð okkurt!
pf Skálabúðin
DR. JACOBSENSGØTA · TEL. 315 315


Matstovur keypa gass
og køksútbúnað
frá
p/f Sveisingahandilin
Mykinesgøta 8 · FO-100 Tórshavn · Tel 311909


SKORA
VIÐ SISU
SISU
Föroya Bjór

FAROE SHIP

# SPEKT kann hjálpa tær við




SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. · Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn · Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT | løggildir grannskoðarar

## Gullpakkin við keypi av nýggjum bili

# Við Gullpakkanum vinnur tú hvørja ferð

**Tá tú keypir nýggjan bil frá Auto Service, fylgir Gullpakkin við, sum ger at tú sleppur undan at hugsa um útreiðslur til viðlíkahald og eftirlit av bilinum næstu trý árini.**





*Heðin Weihe, verkstaðsleiðari*

Visti tú av, at tú eigur, sambært framleiðaranum av bilinum,  í minsta lagi einaferð um árið til eftirlit við bilinum fyri at varveita garantiið ?

Somuleiðis mást tú skifta olju í mun til, hvussu nógv tú koyrir, perur fara, sprinklaraveska skal fyllast á so hvørt, og so alt annað, so sum bremsur, útstoyt og stoytdoy-varar kunnu fara.

Alt hetta kann gerast til heilt fitt av peningi. Men við Gullpakkanum, sum fylgir við, fært tú alt hetta fyri einki..! Ja, í veruleikanum fært tú ein mekanikara við eykalutum í 3 ár ella til tú hevur koyrt  90.000 km, við í prísinum, tá tú keypir nýggjan bil frá okkum.

Vælkomin til eitt gott bilakeyp.



**Í Gullpakkanum fært tú:**

- Eftirliti og viðlíkahald av bilinum og harafturat allar neyðugar umvælingar
- Arbeiðsløn, eykalutir sum t.d. perur, viskarabløð og neyðugar veskur og viðlíkahalds- og umvælingararbeiði.
- Tað vil siga: **Ongar viðlíkahalds-útreiðslur komandi trý árini!**

Sí treytir á www.autoservice.fo

Undir Krákugjógv 19 - Postboks 3168 - 100 Tórshavn - Tel 34 54 00 - as@autoserice.fo

**Auto Service**
www.autoservice.fo

BYGMA
BALSLEV

Stuðlar ítróttini

SAMSKIP
Saman røkka vit málinum

yviri við Strond 23 – Postbox 3255 – Tel. 30 88 00 – Fax. 30 88 01 – www.samskip.com




SENDISTOVAN

amr.fo_

# TEY SVØRTU TØLINI

## DYSTARYVIRLIT HJÁ H71 Í FTZ DEILDINI

| Dato | Heimalið | Útilið | Úrslit |
|---|---|---|---|
| 23.09.2015 | H71 | Neistin | 27-16 |
| 26.09.2015 | H71 | StÍF | 25-22 |
| 04.10.2015 | VÍF | H71 | 25-30 |
| 11.10.2015 | H71 | T. Klaksvík | 31-23 |
| 15.10.2015 | Kyndil | H71 | 22-25 |
| 01.11.2015 | KÍF | H71 | 20-25 |
| 11.11.2015 | StÍF | H71 | 21-27 |
| 15.11.2015 | H71 | VÍF | 28-24 |
| 18.11.2015 | Neistin | H71 | 16-26 |
| 21.11.2015 | T. Klaksvík | H71 | 24-37 |
| 29.11.2015 | H71 | Kyndil | 29-24 |
| 13.12.2015 | H71 | KÍF | 24-19 |
| 16.12.2015 | H71 | StÍF | 21-22 |
| 19.12.2015 | Neistin | H71 | 20-20 |
| 06.01.2016 | VÍF | H71 | 19-17 |
| 09.01.2016 | H71 | T. Klaksvík | 38-21 |
| 17.02.2016 | H71 | Kyndil | 26-26 |
| 28.02.2016 | KÍF | H71 | 18-18 |
| 06.03.2016 | H71 | Neistin | 30-24 |
| 13.03.2016 | StÍF | H71 | 21-27 |
| 19.03.2016 | H71 | VÍF | 38-33 |
| 23.03.2016 | T. Klaksvík | H71 | 23-29 |
| 03.04.2016 | Kyndil | H71 | 29-27 |
| 16.04.2016 | H71 | KÍF | |

## STØÐAN FTZ DEILDIN

| Nr. | Lið | Dystir | V.m | T.m. | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | H71 | 23 | 625 | 512 | 113 | 37 |
| 2 | Kyndil | 24 | 659 | 585 | 74 | 29 |
| 3 | VÍF | 22 | 627 | 584 | 43 | 28 |
| 4 | KÍF | 22 | 513 | 473 | 40 | 26 |
| 5 | StÍF | 22 | 577 | 580 | -3 | 22 |
| 6 | Neistin | 22 | 544 | 553 | -9 | 16 |
| 7 | T. Klaksvík | 23 | 520 | 778 | -258 | 0 |

*Dagført: 12.04.16*

# LIÐINI HESUFERÐ

## H71

**Málmenn:**

1 Ári E. Dam
12 Tóraldur Kollsker
16 Johan Hofgaard

**Útileikarar:**

2 Djóni Vest Højgaard
3 Mark Lausen Marcher
4 Rúni Vest Højgaard
5 Rasmus Rasmussen
6 Boas Heinesen
8 Pætur Thomsen
11 Hans Kári Hansen
13 Oddur Bech
14 Sigmundur Dahl
15 Sigmundur Nolsø
18 Andor Sivertsen
22 Helgi Hoydal
23 Hilmar Leon Jakobsen
45 Peter Krogh
89 Jónas Djurhuus
99 Tróndur Arge

*Venjarar:*
**Petur Mittún**
**Halgir Dahl Olesen**

*Málmansvenjari:*
**Jens á Skipagøtu**

*Liðleiðarar:*
**Petur Sivertsen**
**Rene Dahl Olesen**
**Andras Marr Poulsen**

*Fysioterapeut:*
**Bartal Dahl Andreassen**

## KÍF

**Málmenn:**

1 Emil Dam
99 Jaspur við Garð

**Útileikarar:**

9 Fríði Weyhe
14 Pætur J. Debess
13 Tony Weyhe
14 Poul F. Egholm
17 Teitur Joensen
24 Vilhelm Magnussen
27 Hans Eli Sigurbjørnsson
29 Rógvi Weyhe
34 Rúni joensen
37 Jákup Trygvason
39 Ási Dam

*Bonkur:*
**Jeppe Borch**
**Eddie Hl Joensen**
**Magnus D. Jacobsen**

»GOTT ER AT HAVA
GÓÐAN Í RÁÐUM«



ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4

YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 203040 · FAX 203041 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
LAWFIRM@LAWFIRM.FO
WWW.LAWFIRM.FO

JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR
JULIANNA KLETT